# Sjáldsamur fiskur fingin í Miðvági

**Sunnudagin fingu tveir sandavágsdreingir ein sjáldsaman fisk á sandinum í Miðvági. Talan er helst um fisk, sum á donskum verður nevndur »Makrelgedde« og vanliga livir í tropiskum og subtropiskum sjógvi**

SJÁLDSAMUR FISKUR
*Edvard Joensen*



*Hørdur Johansen og Hans Otto Samuelsen úr Sandavági fangaðu seinnapartin sunnudagin ein sjáldsaman fisk á sandinum í Miðvági*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Talan er helst um fiskin, sum á donskum verður nevndur »Makrelgedde«. Fiskurin er umleið 30-35 centimetrar til longdar.*

**Miðvági:** Tveir samdavágsdreingir gjørdu ein sjáldsaman fong á sandinum í Miðvági sunnudagin. Teir fingu ein fisk, sum helst er tann, ið á donskum verður nevndur »Makrelgedde«, og vanliga livir í nógv heitari sjógvi enn okkara.

Teir báðir smádreingirnir, Hørdur Johansen og Hans Otto Samuelsen, mundu halda botndystin í fyrstu deild millum FS Vágar og VB vera í so keðiligan og fóru í staðin ein túr oman á sandin at vita, um ikki okkurt meira áhugavert mundi vera har at finna.

Og tað var tað. Teir komu aftur við einum sjáldsomum fiski, teir høvdu fangað í fjøruni. Fiskurin var mjáur og blankur og eyðkendur av kjaftinum, við sínum spíska nevi framúr. Hesin silvurblanki fiskurin var umleið 30-35 centimetrar til longdar. Lítið lív var í honum, tá teir fangaðu hann, og tað var skjótt, at hann doyði, hóast teir vóru rímiliga kvikir at fáa hann í eina spann, sum teir lótu sjógv í.

Hørdur og Hans Otto vóru sera spentir og hildu seg hava fangað ein svørðfisk. Og hóast tað ivaleyst ikki er so frægur fongur, teir hava fingið, er eftir øllum at døma kortini talan um sjáldsaman fisk, sum livir í umleið somu høvum, sum svøðfiskurin ger. Helst er her talan um ein fisk, sum á donskum veðru nevndur »Makrelgedde« og livir í tropiskum og subtropiskum sjógvi.

Um hendan fiskin verður í donskum fiskabókum sagt, at hann á latíni verður nevndur »Scomberésox sãurus« og verður 30 til 45 centimetrar til longdar. Fiskurin livir í tropiskum og subtropiskum sjógvi, og er á ávísum árstíðum at síggja í torvum fram við bretsku strondunum. Onkur hendingur er fingin í Norðsjónum og eisini so eystalaga sum í Oyrasundi er hann sæddur.

So talan er um heldur sjáldsaman gest á okkara leiðum, sum teir báðir Hørdur og Hans Otto fingu í Miðvági hendan dagin.

Roynt varð, áðrenn blaðið fór til prentingar, at fáa nærri at vita um fiskin av Fiskirannsóknarstovuni. Men har var eingin í húsinum, sum kundi siga nakað um hann.

# Fyrireika heystið á útoyggj

**Útoyggjafelagið leggur seinastu hond á fyrireikingarnir til heystið 2003, sigur felagið í tíðindaskrivi, sum sent er út um dagarnar**

ÚTOYGGJAR
*Edvard Joensen*



*Esbern í Eyðansstovu í Mykinesi mannar saman við Óla Jákupi í Dímun og Olgu Biskopsstøð starvsnevndina í Útoyggjafelagnum*

*Mynd: Edvard Joensen*

Útoyggjafelagið leggur í løtuni seinastu hond á fyrireikingarnar til heystið 2003. Felagið hevur fingið nakað av peningi at arbeiða við, og hol er tískil sett á fleiri mál, sum hava ligið á láni.

Mál sum oljumálið - oljuflutningur til útoyggjarnar - framleiðsluhúsini og økt tyrluflúgving, eru mál, sum liggja fyrst fyri, sigur Olga Biksopstøð, skrivari hjá Útoyggjafelagnum.

Útoyggjafelagið fegnast um tíðindini um, at nú fer okkurt at henda í útoyggjamálum, sigur felagið í tíðindaskrivinum, sum sent er um dagarnar.

Felagið sigur í tíðindaskrivinum, at tað er av størsta týdningi, at ymsu aðalráðini hjá landstýrinum samstarva, so tey eru tilvitað um, hvat hendir á útoyggj, tá lógir reglur ella fyriskipanir skulu setast í gildi.

Útoyggjafelagið vónar, at peningur fer at verða nýttur soleiðis, at tænastustøðið, sum er nógv lægri á útoyggj, enn tað er aðrastaðni í landinum, kann hækka og koma á hædd við tað, onnur hava.

Ætlanin er at seta ein bólk at arbeiða við málum, sum skulu vera útoyggjum at frama. Og tað er neyðugt, heldur Útoyggjafelagið. Tí útoyggjum tørvar veruliga ítøkiligar loysnir og verulig framstig, um liviligt skal vera á útoyggj í Føroyum.

Útoyggjafelagið hevur nú umleið 200 limir, siga tey í tíðindaskrivinum. Hvør bygd hevur valt ein persón at umboða bygdina í umboðsráðnum. Umframt umboðsráðið er vald ein starvsnevnd við trimum persónum. Tey eru Óla Jákup í Dímun, sum er formaður, Esbern í Eyðansstovu í Mykinesi og Olga Biskopstø í Klaksvík, sum er skrivari hjá Útoyggjafelagnum.

Eitt av ítøkiligastu úrslitum felagsins er felagsblaðið Glóðin, sum viðger mál, ið hava við útoyggja og tilveruna har at gera. Næsta blaðið, sum kemur út í september mánað, fer millum annað at lýsa arbeiðsætlanina hjá Útoyggjafelagnum, sigur felagið í tíðindaskrivinum.



UTTAN ÚR HEIMI

# Kroystur Gøran Persson leggur eftir sínum egnu

**Um fimm vikur verður fólkaatkvøða í Svøríki um evruna, men enn bendir alt á, at sviar fara at siga nei. Forsætisráðharrin hvessir nú sítt stríð fyri evruni**

SVØRÍKI
*Árni Joensen:*

-Tað nyttar einki at skifta orð við Leif Pagrotsky, segði Gøran Persson, forsætisráðharri, um vikuskiftið. Leif Pagrotsky er vinnumálaráðharri í stjórnini hjá Persson og hart ímóti at seta evruna í gildi í staðin fyri krónuna.

Orðini hjá forsætisráðharranum eru eitt týðiligt tekin um, at stríðið upp undir fólkaatkvøðiuna er harðnað, og tey, sum eru ímóti evruni, løgdu alt fyri eitt eftir Gøran Persson. Tey fýltust á, at forsætisráðharrin leggur eftir sínum egnu ráðharrum, uttan at teir fáa høvi at verja seg.

Tríggir av ráðharrunum í stjórnini hava alment boðað frá, at teir eru ímóti felags evropeiska gjaldoyranum. Umframt vinnumálaráðharran eru tað Margareta Winberg, varaforsætisráðharri og Marita Ulvskig, mentamálaráðharri.

Men tað eru ikki bara ráðharrarnir, sum standa fyri skotum forsætisráðharrans. Eisini samstarvsflokkarnir hjá stjórnini, Vinstriflokkurin og Umhvørvisflokkurin, fáa av at vita frá Gøran Persson, sum leggur teir báðar flokkarnar undir at royna at fáa Svøríki úr ES.

Í seinastuni hevur Gøran Persson kunnað ugga seg við, at alt fleiri av hansara sosialdemokratisku flokslimum taka undir við evruni. Herfyri søgdu bara 29 prosent prosent av sosialdemokratisku veljarunum ja til evruna. Nú siga 35 prosent ja. Men framvegis siga 43 prosent av sosialdemokratunum nei, og veljarakanningarnar, sum umfata allar veljarar, vísa, at tað verður tungur róður hjá Gøran Persson tær næstu vikurnar.

# Merktu hvalirnar



Fyri fýra mánaðum síðani gjørdu fimm grindahvalir landgongd í Florida Keys í USA. Síðani hava djóralæknar og onnur havt eftirlit við hvalunum, og sunnudagin vórðu teir sleptir leysir. Men fyrst fingu teir hvør sín fylgisveinasendara, so vísindafólkini kunnu fylgja við teimum.

# Núrnberg-rættarmálini koma nú á alnótina

**Kendi amerikanski lærdi háskúlin Harward er í ferð við at leggja Núrnberg-rættarmálini aftan á seinna heimsbardaga út á alnótina**

RÆTTARMÁL
*Árni Joensen:*

Fleiri bøkur eru skrivaðar um krígsbrotsmannadómstólin og rættarmálini í Núrnberg aftan á seinna heimsbardaga, og nú verða øll skjølini frá málunum løgd út á alnótina. Á Harward University hava tey sett sær fyri, at almenningurin skal fáa atgongd til 82.000 skjøl frá rættarmálunum, samstundis sum fólk fáa høvi at fylgja gongdini í teimum einstøku málunum.

Upprunaskjølini vórðu skrivað á tunt pappír, og yvirhøvur eru tey í vánaligum standi. Tað hevur eisini havt við sær, at eingin hevur havt atgongd til skjølini í mong ár.

Deborah Lipstadt, professari, heldur, at tað kann hava stóran týdning at almannakunngera skjølini og rættarmálini. Eitt nú heldur hon, at hetta kann teppa tey, sum framvegis halda uppá, at tosið um nazistisku jødeatýningina er íspunnið.

Tað fer at kosta Harward University einar tíggju milliónir dollarar at fullføra verkætlanina, og stovnurin er nú í ferð við at savna pening til endamálið. Tær fyrstu 7.000 síðurnar eru longu komnar á alnótina. Tær eru um rættarmálini ímóti læknum og vísindamonnum, teirra millum persónliga læknanum hjá Adolfi Hitler, Karl Brandt.

## Óttast yvirgang í London

Bretska løgreglan ber ótta fyri, at sjálvmorðsbumbumenn fara at gera um seg í London, og løgreglumenninir í býnum hava tí fingið boð um at skjóta, fáa teir illgruna um, at fólk kunnu hava eina bumbu uppi á sær.

Løgregluovastin í London, John Stevens, gav í síðstu viku øllum løgreglumonnunum í býnum boð um at vera á varðhaldi. Orsøkin var sambært blaðnum The Sunday Telegraph, at fregnartænastan hevði fingið frænir av, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda hevði lagt ætlanir um at søkja at almennum bygningum í bretska høvuðsstaðnum.

Ein kelda í løgregluni sigur fyri blaðnum, at eftir boðunum frá John Stenens hava fleiri hundrað løgreglumenn í London fingið heimild til at skjóta við skørpum, halda teir seg hava illgruna um, at fólk hava spreingievni uppi á sær ella í bilinum.

## Løgreglan til árar

Seinastu umleið tríati árini hava løgreglumenninir í italska býnum Venezia nýtt motorbátar, tá teir hava verið á eftirlitsferð kring býin, men nú hava teir fingið boð um at seta seg við árarnar ístaðin fyri.

Boðini eru komin frá løgregluovastanum í býnum, og endamálið sigst vera at verja umhvørvið. Annars hava fólk í Venezia ikki sæð løgreglumenn rógva síðani 1970, tá løgreglan settist við árarnar til heiðurs fyri etiopiska keisaran Haile Selassie, sum var í Venezia og vitjaði.

Blaðið Corriere della Sera skrivar, at løgreglumenninir hava góðtikið boðini frá ovastanum. Tann fyrsti árabáturin hjá løgregluni er klárur, skrivar blaðið, men tað er ikki greitt, nær hann skal á ta fyrstu eftirlitsferðina.

## Aputrot í USA

Amerikanskir granskarar kæra seg nú um, at teir hava ov fáar apur til at gera neyðugar kanningar við heilivági.

Talan er um rhesuapur, sum verða nýttar til at kanna, hvussu nýggjur heilivágur ávirkar tær, og um heilivágurin kann nýtast til fólk. Men í seinastuni eru granskarar farnir at nýta so nógvar apur til AIDS-kanningar og til kanningar í sambandi við lívfrøðilig hópoyðingarvápn, at tað stendur á hjá øðrum granskarum at fáa nógv nógvar apur til sínar kanningar. Tað hevur eisini havt við sær, at eftirspurningurin er stórur, og tað hevur aftur elvt til, at apurnar eru vorðnar rættiliga dýrar. Tað hendir meiri enn so, at ein rhesuapa fer fyri einar 70.000 krónur, skrivar AP.

Tey, sum standa fyri AIDS-kanningunum í USA, siga, at aputrotið fer at seinka teimum neyðugu kanningunum. Ruth Ruprecht, granskari, sigur, at hon hevur bílagt 86 apur til AIDS-kanningar, men at hon noyðist at søkja um eykajáttan fyri at fáa pengar til at keypa apurnar, nú tær eru vorðnar so dýrar.

## Ikki bara Fríðrikur

Donsku fjølmiðlarnir hava seinastu vikuna skrivað eina síðu fyri og aðra eftir um Fríðrik krúnprins og unnustu hansara, ta avstralsku Mary Donaldson, nú alt bendir á, at tey bæði skjótt verða trúlovað.

Men tað er ikki bara í Danmark, at trúnarvingin ætlandi verður trúlovaður um stutta tíð. Svenskir fjølmiðlar eru nú farnir at skriva, at Victoria krúnprinsessa verður trúlovað unnusta sínum, Daniel Westling, innan eitt ár er farið. Orsøkin til skrivingina er, at tey bæði herfyri vóru í brúdleypi hjá einari vinkonu krúnprinsessunnar, og tá trúnarvingar alment vísa seg saman við sínum unnusta, plagar tað at vera tekin um, at kongshúsið hevur givið sítt samtykki.

Ein, sum kennir Victoriu og Daniel Westling væl, sigur við Aftonbladet, at tey verða trúlovað innan eitt ár. Í Danmark vænta tey kongakønu, at har verður trúnarvingin trúlovaður longu í heyst.